# r í aldargomlum umhvørvi




Uni Leitistein Hansen frammanfyri arbeiðsplássinum hjá sær

ein stova frá gamlari tíð er eisini varðveitt, sum eitt minni um tað tíðina, tá Nordisk Film var millum Heimsins fremstu filmsframleiðarar.

## Nógv fólk vitja

Uni fortelur, at hóast Nordisk Film ikki spælir sama leiklut í heimsumfatandi filmsídnaðinum í dag, so eru tað kortini nógvir søgufróir filmsentusiastar, sum koma á vitjan hjá Nordisk Film í Valby, fyri at kunna síggja og kenna søguna hjá Heimsins elsta filmsfelagi. Uni tekur meg yvir til tann tiltikna gula húsaveggin, har Egon Olsen plagdi at koma undan. Guli húsaveggurin undirstrikar, sum alt annað, at úti í Nordisk Film ætla tey ikki at lata søguna doyggja. Kortini máttu teir lata tann steinlagda vegin í Korsbæk frá Matador-røðini fara, í samband við eina umbygging. Nógvir kendir danskir filmssjónleikarar og leikstjórar eru eisini javnan at síggja úti á Nordisk Film, og hevur Uni havt høvið at heilsa uppá tey flestu innan filmselitina í Danmark. – Tað eru fólk, sum tú og eg. Tað er bara í fyrstani, at ein er so ovurglaður fyri at síggja hesar stjørnurnar, men tá ein tíð er farin, so gerst hetta gerandiskostur. Sigur Uni, sum sostatt hevur havt eina skjóta tillagingartíð, til tað serliga arbeiðsumhvørvið úti á Nordisk Film.

## Hava selt hálva miljón eintøk

Substanz Film hevur veruliga gjørt vart við seg, við sínum søguligu filmsverkætlanum. Bara í Danmark hevur filmsfelagið megna at selt eina hálva miljón eintøk við søguligum sjónbóndsfløgum, sum eru skornar eftir líknandi leisti, sum "Føroyskar søgur". – Substanz Film hava rakt okkurt hjá fólki, sum tey hava tikið væl ímóti. Tað hevur verið ein tørvar á, at fólk hava fingið fatur í hesum gomlu filmunum, og at bjarga teimum, áðrenn teir forfarast. Greiðir Uni frá. Substanz Film hava eisini gjørt søguligar filmsverkætlanir við filmsbrotum úr Noregi, Finnlandi og Svøríki. Í teimum førunum hava teir á Substanz Film havt vitjan av konsulentum og filmsfólkum frá teimum avvarðandi londunum. Talið av filmsframleiðslum er komið upp á 80 filmar, sum viðgera søguna hjá fimm ymiskum norðurlondum. Í einum minni bygningi er eitt rættiliga stórt lagur við øllum teimum ymisku sjónbandsútgávunum. Tá talan er um tær donsku, svensku og norsku útgávurnar sæst, at talan er eisini um serstakar filmsverkætlanir frá ymiskum landspørtum, og eisini frá ymiskum tíðarskeiðum. Eisini er talan um ymisk evnir, sum t.d. kongshúsið, seinni veraldarbardagi, lýsingar gjøgnum tíðirinnar o.s.fr.

## Føroyski søgur 2

Substanz Film og Eik Banki høvdu somikið góðar royndir av "Føroyskum Søgum", at nú liggur ræðið fyri at framleiða ein "tveyara". Uni og klipparin, Helgi Toftegaard úr Fuglafirði vísa mær ymisk filmsbrot. Áhugavert er brotið, sum Jákup Andreas Arge hevur tikið á Tórshavnar Skipasmiðju, tá Þorkeningur fór av bakkastokki. Uni hevur fingið til høldar framúrskarandi røðuna, sum Petur Mohr Dam helt í samband við hátíðarhaldið. – Hendan røðan hjá Petur Mohr Dam er simpelthen "Winston Churchillsk". Sigur Uni við hávirðing, og sipar hann til



Gomul hondvunnin mylna, sum varð brúkt til at gera vind í teimum gomlu filmsdøgunum



Tiltikni húsaveggurin, har Egon Olsen plagdi at koma gangandi við enn einari ætlan



Uni við rullistólinum hjá Tante Møhge úr Matador